# BØNARLØTAN

**JUNI, JULI og AUGUST** **2020** **35. árg.**

***1. dagur*** ***Jer. 46.1-28, Luk. 11.33-54, Luk. 17.1-21***






## TEILAND, Chiang Mai
## Corine og Sørin Joensen
## Eli 15, Aron 8, Noah Kristian 6

Av covid-19 er Teiland í undantaksstøðu. Flogvallir eru stongdir, ferðing sera avmarkað og strangar avmarkingar at savnast. Føroyingar hava sent fíggjarligan stuðul, og í løtuni hjálpa vit 40 familjum, ið ikki hava fyri mat. Vit halda á, so leingi stuðulin røkkur. Stuðul kann flytast á konto í Betri 9181-436.326.6, viðmerk „Thailand“.

## KRINGVARPIÐ

7. juni Útvarpsmøti, Betania, Porkeri
14. juni Sjónvarpsandakt, Heðin Poulsen
21. juni Sjónvarpsandakt, Heðin Poulsen
28. juni kl. 16 Sjónvarpsmøti, Kedron, Sørvágur
28. juni Sjónvarpsandakt, Jákup N. Olsen
4. aug. Útvarpsmøti, Elim, Søldarfjørður

**R7** (meir á www.evr.fo)
Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*
★ 1. juli fyllir Miriam Berghamar 17 ár
★ 1. august fyllir Andreas Nónstein 11 ár

***2. dagur*** ***Luk. 6.1-26, 2. Sám. 4.1-12, Luk. 17.22-37***



## FØROYAR, ZAREPTA

Summarlegurnar í ár eru avlýstar. Biðið fyri familjum og børnum, sum tí ikki koma á legu. Skipað verður fyri viðlíkahaldsarbeiði ávísar dagar í summar. Kunning hjá Jákup N. Olsen, tel. 217840.

## Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi

Eg eri takksamur at hava verið við í arbeiðnum í Zarepta í vetur. Korona gjørdi, at vit hava arbeitt uttan steðg, tí ongar legur hava verið í vár. Koronatíðin letur eisini upp fyri viðlíkahaldi í summar.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen, Josva 10, Ester 9, Samuel 5**

## 3. dagur Luk. 6.27-49, 2. Sám. 5.1-24, 2. Sám. 20.1-26

*Hjartaliga tillukku við gullbrúdleypinum!*



**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**

20. juni hava Susan og Øssur verið gift í 50 ár. Tey vóna at kunna halda dagin saman við familju og samverkafólki. Sjúklingar í Danmark fáa nú ikki vitjanir. Andaktirnar í túninum uttan fyri Sjúklingahotellið halda tó á; hetta hjálpir okkum at varðveita sambandið við teir og avvarðandi. Vit verða her í summar. berghamar@kristnastova.dk

## 4. dagur Jer. 47.1-7, 2. Sám. 6.1-23, 2. Sám. 21.1-22



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 12, Andreas11 Kristina 9**

„Eftir 13 ár í verkinum í Kristnastovu kenna vit Harran leiða okkum aftur til Føroya. Tíðin hevur verið signingarrík, og vit eru takksom fyri at hava havt lut í tænastuni millum føroyingar, fyri samfelag við nógvar útisetar og gott samstarv við samverkafólk. Tit har heima hava biðið fyri okkum og stuðlað á ymsan hátt. Takk fyri tað! Haldið á at biðja, sum vit søkja Harrans leiðslu". Niels Pauli heldur á sum leiðari fyri Kristnastovu eina tíð og kemur at ferðast til Keypmannahavnar.

**Sólva og Jákup Hansen**

Fríggjakvøldssamkoman er farin í summarfrí; byrjað verður aftur 21. aug. Møtini sunnudag kl. 11 halda á alt summarið!

## *5. dagur* *Jer. 48.1-24, Luk. 12.1-15, Luk. 18.1-17*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Vit eru framvegis at hitta á Lívlinjuni, tel. 511804 ella 212045.
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
★ 5. august fyllir Caleb Hansen 18 ár
★ 5. august fyllir Karis Flanagan 7 ár

## *6. dagur* *Jer. 48.25-47, Luk. 12.16-40, Luk. 18.18-43*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Eg eri í Skotlandi, undirvísi í málfrøði á netinum. Í Meksiko halda Sue og mixtectoymið á at umseta á netinum. Netsambandið er truplari um summarið av regni og toruveðri. Í juni kann eg fara aftur til Meksiko, men enn eru ferðaavmarkingar í Oaxaca av Covid-19.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 16, Victoria 14,**
**Emma Grace 12, Jónatan 10,**
**Markus 8, Evita 5, Joy 3**
Korona er ikki komið til okkara enn. Óvissan og óttin fyri farsóttini hevur havt positiva andaliga ávirkan – meir gudsótti, takksemi fyri frælsi og gleði at savnast sum systkin um Orð Guds.



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Fundirnir í Jakarta, Manila og Chiang Mai eru útsettir. Eg skal læra ein bíbliuflokk á netinum í summar í okkara egnu samkomu. So skjótt til ber, vitja vit fólk í Kentucky og tvær samkomur í Missouri umframt vinir og lærarar á venjingarskúlanum.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Vit halda á at stroyma møtir, sunnudagsskúla og bíbliuundirvísing. Gott at vita, at fólk runt allan heimin lurta.



**ÍSLAND, Akureyri,**
**Sjónarhæð, Ástjørn**
**Kristín Gerðalíð, Agape Europe**
Í mai varð Ísland spakuliga latið uppaftur; vit í bíbliubólkinum gjørdu av at møtast og grilla saman. Ætlanin er at fáa samband við næmingar umvegis netið. Vit vóna at møtast í summar til bíbliubólkar og samfelag.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**
⋆ 7. juni fyllir Boas Jacobsen 13 ár

## *8. dagur* *Luk. 7.24-50, 2. Sám. 7.1-29, 2. Sám. 22.26-51*

### OM-FØROYAR

Biðið fyri TeenStreet LIFE 4.-8. aug. – ein øðrvísi online uppliving. Tilmelding á teenstreet.fo.

### LOGOS HOPE



**Bogi og Olivia Tróndheim,**
**Fríða 4, Karita 2**

Biðið, at skipið fær neyðuga góðkenning til framhaldandi sigling, og at manningin fær nýtt mót í bíðistøðuni. Føroyingarnir umborð hava tað gott. Femja kemur væntandi heim í juni og Tróndheim-familjan í juli.

★ 8. juli fyllir Liljan Tindalíð 15 ár

## *9. dagur* *Jer. 49.1-19, 2. Sám. 8.1-18, Luk. 19.1-27*



### NTM, FØROYAR

**Erla og Ingvard Petersen**

Ingvard undirvísir á netinum í Hebrearabrævinum fyri næmingunum á North Cotes College til fyrst í juli. Samstundis undirvísir hann í fleiri samkomum kring landið. Biðið um skynsemi og vísdóm í gransking, fyrireiking og framløgu. Bíbliutímarnir hjá Erlu eru farnir í gongd aftur; biðið fyri henni og teimum, sum luttaka.

### NTM - FØROYAR

**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 9, Tabita 6, Debora 4, Natan 1**

★ 9. juni fyllir Jenny í Prestgarði 13 ár

**10. dagur** **Jer. 49.1-19, 2. Sám. 9.1-13, Luk. 19.28-48**

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Vit møðast av at vera avmarkað til heimið, men eru takksom, at Ivor fekk í lag at keypa samkomubygningin. Gud virkar gjøgnum netbornu tænasturnar. Ivor og samkomuleiðslan ætla at byrja møtir eftir 20. juli.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 16, Noah 14, Lydia 3**

Vit verða í Danmark í summar. Dóttir okkara Hannah vónar at koma til Føroya at arbeiða í juli-aug. Í koronatíðini vilja vit fegin hava møtir og tiltøk, sum røkka út til menniskju við Guds kærleika.

**11. dagur** **Luk. 8.1-18, Luk. 13.1-17, 2. Sám. 23.1-39**



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Samkomurnar í Danmark hava opið aftur. Uttanlandsferðin má bíða til í heyst. Bíbliuumseting fyri deyv kring heimin hevur av-bjóðingar, tí tørvur er á nakað meir av peningi.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Vit hava samband við fleiri familjur og einstaklingar, sum hava tørv á hjálp og vegleiðing av m.a. familjutrupulleikum, sjúku og fremmandari mentan og máli. Her liggur ein stór uppgáva; brúk er fyri hirðahjarta og næstakærleika.

**12. dagur** **Luk. 8.19-39, Luk. 13.18-35, 2. Sám. 24.1-25**

## GRØNLAND, Qasigiannguit
## Solveig og Daniel Kinda

Vit rokna við at fáa bátin á sjógv í juni og gleða okkum at fara norðureftir í juli-aug. Biðið, at vit fáa rætta toymið til túrin, umframt framhaldandi fíggjarligan stuðul, nú mong eru ávirkað av farsóttini.

**13. dagur** **Luk. 8.40-56, 2. Sám. 10.1-19, Luk. 20.1-26**

## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen



Grønland letur upp í smáum 15. juni. Vit hava avlýst legurnar, tí vit vita ikki, um vit kunnu hava tær og undir hvørjum treytum. Biðið, at nøkur, ið teknaðu seg sum leiðarar, og kanska onnur tó koma at betra um legurnar til næsta ár. Biðið um varðveitslu. Ellisheimið og ein sosialur hjálparstovnur hava biðið um húsini í 4 vikur í heyst. Vit hava tá andakt og sangløtu hvønn dag.

## Juvel II
## Anna og Óli Steinberg



Av farsóttini er hvørki møguligt at siga um ella nær farið verður til Grønlands í summar. Samskifti er við myndugleikarnar í Grønlandi. Farið verður, so skjótt loyvi fæst, møguliga bert partar av ætlaða tíðarskeiðnum.

★ 13. august fyllir Isabel Tuohy 16 ár

***14. dagur*** ***Jer. 50.1-24, 2. Sám. 11.1-27, Luk. 20.27-47***

**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Cecilie 17, Kristian 15**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð, Liljan 15, Leanne 12, Luckas 1**

Av Covid-19 megna vit bert at hava tvær, møguliga tríggjar familjulegur 28. juni til 18. juli, tí trupult er at fáa hjálp úr Føroyum. Thorvald Gaardlykke og Olaf Arge ætla at flúgva um Ísland 17. juni, men henda rutan er óviss. Um tað eydnast, fara teir beinleiðis á leguna einsamallir í sóttarhald og at arbeiða.

***15. dagur*** ***Jer. 50.25-46, 2. Sám. 12.1-31, 2. Kong. 1.1-18***



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

20. mai. fingu vit aftur loyvi at savnast á Malta. Vit fingu tvey barnabørn í mars, so nú eru níggju.



**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**

Summarið verður øðrvísi í ár uttan legur. Men Orð Guds er ikki bundið (2. Tim. 2.9). Vit eru signað við hentleikum at náa menniskjum við evangeliinum. Vit greiða nýggja Emmaus bíbliuskeiðið „Ein Gud, ein vegur“ til prentingar.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 13**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 13, Svend 11, Terji 8, Petra 6**

⋆ 15. juni fylla Micah og Reuben Magura 7 ár
⋆ 15. august fyllir Victoria Tuohy 14 ár

***16. dagur*** ***Jer. 51.1-30, Luk. 14.1-15, 2. Kong. 2.1-25***



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 14, Rebekah 12, Lydia 10**

Vit hava gjørt stóra dagføring av kurdisku bíbliuappini Pertukekem, so hon er lættari at lesa. Biðið, at enn fleiri leita til Orð Guds.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Leygardag hevur Augustin bíbliutíma í útvarpi og á facebook live. Í mai greiddi hann frá, at Jóhannes Doypari peikar á Jesus sum lamb Guds. Saafifólk ofra lomb hvørt ár at rinda fyri synd, men tey vita ikki hví. Augustin roynir at greiða teimum sannleikan um Jesus, sum tey ikki hava hoyrt um. Vit meta, at Harrin leiðir okkum aftur til Føroya í sept.

⋆ 16. juni fyllir Emma Guttesen 4 ár

***17. dagur*** ***Jer. 51.31-64, Luk. 14.16-35, 2. Kong. 3.1-27***

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 17, Megan 15, Trisha 8, Emma 4**

Parola og nógv onnur tiltøk eru avlýst. Men vit hava sum samkoma tó byrjað nýtt átak at hjálpa familjum, sum eru komnar illa fyri av koronu, við mati og klæðum og sjálvandi at vísa teimum á Jesus. Samkoman savnar seg um hetta í summar og roynir at fáa samband við nógv nýggj fólk.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 9, Leah Ève 6, Abigail 0**

## *18. dagur* *Luk. 9.1-22, 2. Sám. 13.1-20, Luk. 21.1-19*




**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Koronutølini eru vaksandi; kortini fara børnini so líðandi aftur í skúla. Vit lata tó ikki Mamelodi uppaftur enn, men royna at vitja heimini við skúlatilfari og andaligum lesnaði.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 17**

Skúlin her í North Cotes er stongdur, men undirvísingin heldur á á netinum. Eg umseti Matteus og rættlesi tilfar til umsetingarráðgeva. Ferðin til Sorimi í sept.-okt. er ivasom av koronu. Tey trúgvandi har hava tað gott; eitt flogfar hevur akkurát flutt teimum brennievni og heilivág.

## *19. dagur* *Luk. 9.23-42, 2. Sám. 13.21-39, Luk. 21.20-38*

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 3, Timon 1**

Biðið, at vit læra kovol mál og mentan skjótt, og at tey síggja Kristus í okkum, longu áðrenn vit megna at samskifta greitt.

**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 12, Noah 11, Karis 7, Judah 5, Ethan 3**

Av Covid-19 fóru vit ikki innaftur í ættarbólkin fyrr enn 26. mai. Húsunum tørvar nógvar ábøtur. Biðið fyri trúboðarafamiljuni, sum í summar kemur at læra um lívið í frumskóginum, at tey fáa dirvi. Mengen samkoman er farin ígjøgnum svára tíð; biðið, at onkur kemur at hjálpa okkum at heimaskúla børnini.

## *20. dagur* *Luk. 9.43-62, 2. Sám. 14.1-33, 2. Kong. 4.1-21*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru í Onglandi, men vóna at sleppa aftur til Turkalands í juni-juli. Skúlin hjá Anniku er liðugur, men henni manglar nakrar praktikk-tímar. Starvsfólkini á bíbliubrævskeiðnum hava arbeitt heima. Vitjanir á heimasíðuni eru fleirfaldaðar. Útigongubann hevur verið í fleiri býum av covid-19.

## *21. dagur* *Jer. 52.1-14, Luk. 15.1-19, 2. Kong. 4.22-44*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 8**

18 ung eru klár at fara úr Týsklandi til ymisk lond í 1-2 ára tænastu við Etnos360. Biðið, at avmarkingar at ferðast verða broyttar, og at Gud gevur okkum vísdóm at fyrireika tey til tænastuna.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *22. dagur* *Jer. 52.15-34, Luk. 15.20-32, 2. Kong. 5.1-27*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

Simon arbeiðir heiman. Av Covid-19 eru stevnur og møtir avlýst. Biðið, at Harrin gevur íblástur at náa menniskjum á øðrvísi hátt. Vit vóna at koma til Føroya í ein mánað uml. 20. sept. Um tit ynskja at fáa Simon at tala, fæst samband við hann á bluemaruti@gmail.com

## 23. dagur — Luk. 10.1-22, 2. Sám. 15.1-16, Luk. 22.1-23



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit rættlesa umseting av Esaiasarbók. Annars flyta vit í nýggja íbúð í juni.

★ 23. august fyllir Ethan Flanagan 3 ár

## 24. dagur — Luk. 10.23-42, 2. Sám. 15.17-37, Luk. 22.24-46



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 10, Nana 8, Louie 6, Rio 1**

Av Covid-19 er undirvísingin í enskum fyri børn útsett, til skúlarnir byrja aftur. Biðið, at vit koma at kenna foreldrini, knýta vinabond og fáa høvi at siga teimum um Kristus.

★ 24. august fyllir Louis Hansen 3 ár

## 25. dagur — 2. Sám. 1.1-27, 2 Sám. 16.1-23, Luk. 22.47-71



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Av covid-19 hava vit ikki savnast til bíbliutímar síðan mars. Tey trúgvandi lurta eftir upptøkum av bíbliutímum. Biðið, at tey halda seg til Harran og sleppa gomlum siðum. Ungi umsetarin er einasti trúgvandi í bygdini, sum hevur slept øllum tí gamla; hann følir seg ofta einsamallan. Tey, eg arbeiði saman við, fara øll í farloyvi, so skjótt til ber. Eg umhugsi, hvat eg skal gera ímeðan.

## *26. dagur* *2. Sám. 2.1-32, Luk. 16.1-13, 2. Kong. 6.1-33*

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 11**
Vit kunnu ikki fara aftur til Senegal fyrr enn eftir 30. juni. Biðið fyri nalu fólkinum, tí regntíðin byrjar í juni; tá fáa nógv malaria. Vit vóna at finna íbúð tætt við Dakar Academy, har Ryan skal ganga í skúla saman við trúboðarabørnum – um 200 í tali úr eini 40 londum.

## *27. dagur* *2. Sám. 3.1-19, Luk. 16.14-31, 2. Kong. 7.1-20*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 16, Rebekka 15, Hanna 12**
Vit arbeiða heiman. Eg havi gjørt barnabíbliu við 78 kendum søgum, sum ættarfólk nú skulu rættlesa. Í ættini gongur væl, tey trúgvandi einast, fleiri savnast enn vanligt, og tey væla um samkomuhúsið. Viðhvørt er gott at vera avskorin, tí nú taka tey sjálv størri ábyrgd.

**FILIPSOYGGJAR, Manila**
**Liz og Ragnar Niclasen**
★ 27. juli fyllir Noah Guttesen 18 ár

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Durita Olsen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## *28. dagur 2. Sám. 3.20-39, 2. Sám. 17.1-29, 2. Kong. 8.1-29*



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Skógurin er fullkomiliga avbyrgdur. Trúboðarar sleppa hvørki inn ella út. Ikki er loyvt at ferðast ímillum landspartar. Einki bensin verður selt. Bert matvøruhandlar eru opnir, og øll skulu vera við hús kl. 14. Bíbliuskúlin er enn í gongd uttan vitjan.

## *29. dagur Luk. 11.1-13, 2. Sám. 18.1-33, Luk. 23.1-19*

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 7, Micah 7**
Samkoma á netinum hevur eydnast væl. Solomon talar, og Jeanette skipar fyri sunnudagsskúla. Møtir eru loyvd aftur, men við frástøðu. Okkum tørvar vísdóm at boða teimum gleðiboðskapin, sum ikki koma á møti. Takkið, at iranska gentan, ið mátti rýma úr Iran og Sveis, hevur fingið uppihaldsloyvi í Onglandi; hon gleðist at vitna um Harran.
★ 29. juli fyllir Timon Hansen 1 ár

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *30. dagur* *Luk. 11.14-32, 2. Sám. 19.1-23, Luk. 23.20-34*

### FØROYAR

**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 12**

Av koronu havi eg havt lítið virksemi; hinvegin bleiv møguligt at fyrireika tilfarið. Tíðin hevur eisini lært okkum nógv um heilsustøðuna hjá Adoniu. Biðið fyri heilsu okkara.

## *31. dagur* *2. Sám. 19.24-43, Luk. 23.35-56*




### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

### NÝGGJ BÓK! 195 kr.

Ravi Zacharias flutti heim til Harran 19. mai, 74 ára gamal. Hann varð føddur í India, og hevur seinastu 40 árini tænt lesandi og dugað framúr væl at samskift við ung um trúarspurningar. Ravi og Abdu, sum báðir hava eysturlendskar røtur, viðgera evangeliið um Kristus úr eysturlendskum sjónarhorni, men sum tó eisini fevnir um okkum vesturlendingar. Boðskapurin er tann sami um hin livandi og virkandi Jesus, sum gevur menniskjum nýggja vón og nýtt lív.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo